## Skýmingarhald á Oyrarbakka

Í kvøld, mikukvøldið, kl. 19 verður skýmingarhald á Sunda bókasavni á Oyrarbakka. Evnið er (M)orðið í Norði.

Á skránni er upplestur, fyrilestur og tónleikur.

Lena Dam lesur stuttsøgu eftir Einar Petersen: Nemesis á útoyggj (1993).

Kim Simonsen heldur fyrilestur, sum hann nevnir „Modernaðar bókmentir í dag - Millum ævisøguna og krimi".

Oddur Hentze, sum starvast í Norðljómi, stendur fyri tónleikinum. Høvi verður at lána bøkur, og krimisøgurnar eru settar fram á bókasavninum.

Í steðginum eru stundir til eitt prát afturvið einum góðum drekkamunni.

Tiltakið er ókeypis.

## Striptease á Cippo

Fyri fyrstu ferð nakrantíð skipar Cippo fyri striptease. Tað verður nú fríggjakvøldið, tá kendi danski stripparin Bettina kemur at lata seg úr á dansistaðnum.

– Ja tað er fyrstu ferð, at vit skipa fyri tílíkum. November er ein mánaður har tað hendir lítið, og nú er eisini langt síðani at striptease var í Føroyum, so tí hava vit tikið stig til hetta, sigur Rúni Djurhuus, stjóri í Cippo.

Bettina, sum er kend frá TV Danmark og TV2 Zulu, fer tó ikki bara at blaka klæðini fríggjakvøldið. Ein part av kvøldinum verður hon eisini í barrini og serverar toppleys fyri kundunum.



Danmarks Radio í Føroyum:

# Gera film um málið um samkynd

**Í næstan tvær vikur hava tveir mans frá Danmarks Radio verið í Føroyum og fylgt málinum um samkynd. Teir hava prátað við fleiri samkyndar føroyingar, politikarar, vanligar føroyingar og ætla at lýsa virðisstrýðið í føroyska samfelagnum**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Halfdan Muurholm og Jørgen Palmer hava verið í tinginum, til pallborðsfund í Miðlahúsinum, gjørt samrøður við bæði samkynd og politikarar og úrslitið er ein hálvur tíma langur dokumentarfilmur*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Halfdan Muurholm, journalistur, og Jørgen Palmer, myndamaður, hava verið í Føroyum í smáar tvær vikur nú. Báðir arbeiða teir fyri Danmarks Radio, og í løtuni eru teir í fer við at gera ein dokumentarfilm um samkynd í Føroyum, grein 266 b og virðisstríðið, sum teir halda er í føroyska samfelagnum í dag.

– Føroyar er eitt mikrokosmos í hesum málinum, tí hetta er nógv størri enn bara tað, sum hendir her í løtuni, heldur Halfdan Muurholm, journalistur.

Hann er sannførdur um, at málið er áhugavert fyri nógv onnur enn bara føroyingar.

– Nógv hava ta myndina í huga sínum, at Føroyar er hetta lítla paradísi, og tí loypir tað hvøkk á mong, at tit samstundis hava hetta virðisstríðið, sum fyllir so nógv, sigur hann.

### Fylgt samkyndum føroyingum

Í Føroyum hava teir báðir, Halfdan Muurholm og Jørgen Palmer, fylgt tveimum samkyndum føroyingum og familjum teirra og ætlanin er so, at hesir koma at mynda dokumentarfilmin, sum annars kemur at byggja á politikk og trúgv.

Teir báðir leggja dent á, at hetta ikki kemur at vera nýggjheitir, ið teir borðreiða við í filmi teirra, men heldur ein lýsing av menniskjasøgum, har teir grava í dýpdina í málinum og royna at fáa so nógv ymisk sjónarhorn við sum gjørligt.

– Vit hava fingið nakrar ógvusligar útsagnir frá bæði mótstøðufólkum og viðhaldsfólkum av 266 b, men vit hava eisini fingið miðjuna við, fortelja teir báðir.

– Trupulleikin er bara, at vit hava so nógv gott tilfar, at vit uttan himpr høvdu kunnað gjørt ein ein tíma langan dokumentarfilm, men hetta skal altso ikki fylla meir enn ein hálvan tíma.

### Stríð ímillum trúgvandi

Halfdan Muurholm hevði fylgt málinum væl úr Danmark, áðrenn hann kom henda vegin. Hann er tó bilsin av, hvussu trúgvandi føroyingar eru.

– Føroyingar eru nógv meiri trúgvandi enn eg hevði roknað við. Men tað sum hevur gjørt meg allarmest bilsnan, er, at tað er eisini eitt stríð ímillum tey trúgvandi í Føroyum í hesum málinum. Tað eru so nógvir mátar at vera kristin uppá, at eisini her er eitt virðisstríð, sigur danski tíðindamaðurin.

### Koma aftur

Teir báðir donsku tíðindamenninir fara til Danmarkar aftur í morgin, hósdagin. Men teir siga báðir, at teir kundu hugsað sær at komi aftur henda vegin einaferð seinni og fylgja málinum upp.

– Í tí tilfarinum, vit nú hava fingið í Føroyum síggi eg møguleikar fyri at gera ein altjóða dokumentarfilm. Tí á sama hátt sum við Muhammed-kreppuni í Danmark, so hevur hetta eisini nøkur altjóða atlit, sum gera málið áhugavert fyri so mong onnur enn bara føroyingar.

Halfdan Muurholm heldur, at dokumentarfilmurin teir nú gera, so avgjørt er áhugaverdur fyri føroyingar.

– Tað verður hann heilt víst, og ikki minst haldi eg, at nógvir føroyingar høvdu lært nógv um samkynd og hvat tað er fyri nakað, sigur Halfdan Muurholm um filmin, sum væntandi verður at síggja á DR2 fyrst í desembermánaði.

### FAKTA

Halfdan Muurholm og Jørgen Palmer hava verið í Føroyum í næstan tvær vikur, og gera teir ein dokumentarfilm um samkynd í Føroyum.

Filmurin verður ein hálvan tíma langur og verður væntandi vístur á DR2 6. desember.

## Ikki hvør sum helst

**Halfdan Muurholm og Jørgen Palme arbeiða báðir fyri Danmarks Radio. Halfdan Muurholm hevur gjørt fleiri altjóða dokumentarfilmar, og Jørgen Palmer hevur vunnið nógvar virðislønir fyri sítt arbeiði**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Teir báðir danirnir, sum hava verið í Føroyum og fylgt málinum um samkynd, eru ikki hvør sum helst.

Halfdan Muurholm hevur arbeitt í fleiri ár sum journalistur í Suðurafrika, og hevur gjørt dokumentarfilmar og skrivað greinar hagani til danskar og altjóða fjølmiðlar.

Myndamaður hansara á túrinum í Føroyum er Jørgen Palmer, sum er sera høgt í metum í danska fjølmiðlaheiminum. Hann hevur vunnið fleiri altjóða virðislønir fyri sítt arbeiði.

Jørgen Palmer hevur verið í Føroyum áður, men hetta er fyrsta ferðin at Halfdan Muurholm, sum hevur føroyska konu, er í Føroyum.

– Føroyingar eru eitt sera fryntligt fólk. Full av yvirskot og áhuga. Náttúran er eisini fantastisk, sigur Halfdan Muurholm.

Hann heldur eisini, at eru føroyingar fryntligir og fyrikomandi, so stórur munur á fólki.

– Tað er øgiliga stórur munur á einum ungdómi í Havn, og so einum frá eini lítlari bygd, og sum heild er stórur munur á fólkunum í Føroyum. Í okkara filmi royna vit at leggja okkum eftir, at byggja brýr í millum hesar munir, sigur Halfdan Muurholm, sum fegin vil takka teimum, sum hava luttikið í filminum. Serliga teimum teimum samkyndu og familjum teirra, sum hava víst teimum stórt álit og dirvi at siga teirra søgu.